# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Seat Altea Freetrack Prototype



*Seat Altea Freetrack Prototype er ein sportligur 4x4 við viðførishaldarum á takinum og panoramasólataki í royklittum svørtum glasi. Annars er designið í sama stíli sum teir Seat, ið vit kenna*



*Kabinan er í nútímans stíli við leðursetrum og el-stilling av forsetrunum*



*Altea Freetrack sær út sum ein rættuligur "off-roadari" við 19" hjólum, eykahjólinum uttaná baklúkuni og eini fríhæddin upp á er 31 cm*

**Aftur ein nýggjheit frá Seat. Á bilaframsýningini í Genéve í mars var konseptbilurin Seat Altea Freetrack Prototype sýndur fram fyrstu ferð. Talan er um ein sportligan offroadara við 240 hk TFSI-motori**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sponsku Seat frá VW-konsernini hava fingið sín egna sermerkta stíl og rættuliga fingið vind í seglini seinastu árini. Javnan koma nýggj og spennandi modell á marknaðin frá verksmiðjuni í Barcelona.

Á bilaframsýningini í Genéve í mars var konseptbilurin Seat Altea Freetrack Prototype sýndur fram. Hetta er fyrstu ferð í søguni, at Seat koma við einum slíkum bili. Altea Freetrack Prototype er 176,6 cm høgur, 18,5 cm hægri enn nýggi Seat Altea XL, sum báðir eru bygdir yvir sama plattform. Bilurin er ein 4x4 við 2.0 litra TFSI-motori við 240 hk - sami motorur sum er í Seat Leon Cupra við 6-trins girkassa.

Altea Freetrack bæði er og sær út sum ein rættuligur "off-roadari". Við sínum 19" hjólum er hann sera høgur frá vegnum. Fríhæddin er 31,0 cm og dekkstøddin er 255/50-19. Við røttu dekkunum kann hann ivaleyst koyra allastaðni.

Bilurin hevur viðførishaldarar á takinum og panoramasólatak í royklittum svørtum glasi. Sum ein rættur 4x4 hevur hann eisini eykahjólið uttaná baklúkuni. Kabinan er í nútímans stíli við leðursetrum og el-stilling av forsetrunum.

Hóast talan er um ein konseptbil, vátta høgtstandandi persónar hjá Seat í Spania, at bilurin ikki bert er ein framtíðarbilur, men at ein líknandi 4x4 skjótt kemur á marknaðin.